# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**20. sunnudag e. trinitatis**
***Vesturkirkjan kl. 11.00:*** Heri Joensen
Havnar kirkja kl. 11.00: Marjun Lómaklett
***Havnar kirkja kl. 13.30:*** Grønlendsk gudstænasta
***Kirkjubøar kirkja kl. 12.15:*** Heri Joensen
***Hestur kl. 12.00:*** Bergur D. Joensen
***Bøur kl. 11.00:*** David Johannesen, altargongd
***Gásadalur kl. 11.00:*** Bjarni Bæk
***Hósvík kl.12.00:*** Inga Poulsen Dam
***Funningur kl. 12.00:*** Messa, Emil Olsen
***Elduvík kl. 17.00:*** Uni Næs
***Tjørnuvík kl. 12.00:*** Marjun Bæk
***Kvívík kl. 12.00:*** Mogens Tilsted Christensen
***Oyndarfjørður kl. 12.00:*** Jógvan Fríðriksson, altargongd
***Selatrað kl. 16.00:*** Jógvan Fríðriksson
***Klaksvík kl. 11.00:*** Deyvagudstænasta, Jónsvein Bech, altargongd. Talvan gongur fyri Deyvafelagið
***Kunoy kl. 12.00:*** Niels Pauli Danielsen, altargongd
***Klaksvíkar sjúkrahús kl. 10.00:*** Elsa Funding
***Norðoya Røktarheim kl. 14.30:*** Meinhard Bjartalíð
***Hvannasund kl. 12.00:*** Elsa Funding, altargongd. Talvan gongur fyri Sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
***Sandur kl. 12.00:*** Jákup R. Hansen, altargongd
***Vágur kl. 11.00:*** Patrick de Neergaard, altargongd
***Eldrasambýlið í Vági kl. 14.00:*** Patrick de Neergaard, altargongd

**Norðoya vistarheim**
Andakt hóskvøldið kl. 19.30, Elsa Funding

**Konfirmatión í Havnar kirkju 29. okt. 2006 kl. 16.00**
Torkil Dahl Andreassen, Millum Gilja 60, 188 Hoyvík.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagur 26. okt. kl. 17.00: Barnakórið venur.
Hóskvøld 26. okt. kl. 20.00: Bíbliutími v/ Sólbjørg Símunarson, Rómv. kap.8.
Sunnumorgun 29. okt. kl. 10.15: Útferð hjá Sjómanskvinnuringinum. Møtast við Kirkju- og missiónshúsið á Argjum.
Sunnudagur 29. okt. kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøld 29. okt. kl. 18.00: Møti. Filmurin um Luther verður sýndur
Mánakvøld 30. okt. kl. 20.00: Sjómanskvinnuringurin møtist
Sí annars á heimasíðuni
*www.koma.fo*

**Hebron, Argir**
Mikudagin 25. oktober kl. 20: Bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar og vísir film um missión
Hósdagin 26. oktober kl. 20: Ungdómsmøti. Vegna umbyggingina í Ebenezer verða ungdómsmøtini í Hebron til eina ferð í november mánaði.
Sunnudagin 29. oktober: Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Familjumøti - har bæði vaksin og børn fara at luttaka.
Ingvard Petersen, trúboðari í Venezuela luttekur
*www.hebron.fo*

RÆTTING!!!
**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Heimaforbundið skipar fyri **ÁRASØLU** til inntøku fyri Frelsunarherin ***hóskvøldið 26.10 kl. 19.00.***

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Orðsins tænasta v/ kommunion í Kerit.
Fríggjakvøldið 27. okt. kl. 19.30 verður rósukransbøn hjá Gunnleyg Arge.
Leygardagin kl. 11.30: Orðsins tænasta v/ kommunion í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni. Talvan gongur fyri missións arbeiði innan fyri katólsku kirkjuna.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.00 til kl. 18.00. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Øll eru vælkomin.
Fyri tey sum lesa »True Life in God«, Satt lív í Gudi. Bønarløta verður síðsta týskvøld í hvørjum mánaði kl. 19.30 í Mariukirkjuni.
*www.katolsk.fo*

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Fríggjakvøldið kl. 20.00: After Eight.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Kl. 18.00: Sangmøti v/ Magna Christiansen, Terja Vesturgaard, Anniku & Sigrið og Oasu- brøðrum.
Verið hjartaliga vælkomin.
*www.oasan.fo*

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17.00 tímabøn, kl. 19.00 Delli
Hósdagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 19.00 Chill
Fríggjadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 22.00 bøn
Leygardagin kl. 21.00 Flare
Sunnudagin kl. 10.45 morgungudstænasta, kl. 11.30 Barnagudstænasta.
Øll eru hjartaliga vælkomin
*www.filadelfia.fo*

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16 eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 18 – 22 MiniSalt hjá Marna Tausen Bakkagøta 1 á Argjum, kl. 20 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl 18 evangeliskt møti við Bill Justinussen.
*www.gospel.fo*

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00: Møti.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli á Norðrasta Horni.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Bergi D. Joensen.

**Frelsunarherurin**
Mikudag kl. 15 Bøn.
Sunnudag møti kl. 11.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Møti við soldátavígslu kl. 18. drekkamuður aftaná.
Leygardagin 11. nov. kl. 19.00 skipar Heimaforbundið fyri stórari árasølu til inntøku fyri Frelsunarherin, øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Mikudag
kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti - Evni: Kol 3
Hósdag
kl. 20.00 Ungdómsmøti - Møti er í Hebron á Argjum - Talari: Billy Hansen
Fríggjadag
kl. 20.00 Teen-Night – Er í Ebenezer
Sunnudag
kl. 10.00 Breyðbróting
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti - Er um Operation Christmas Child
Heimasíðan: *www.ebenezer.fo*

**Meinigheitshúsið í Havn**
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 9.30 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v. Frants Jensen - evni: Ísrael Guds útvalda fólk. Gentur syngja.
Í november fer Steen Palmquist familjuráðgevi og psykoterapeutur at undirvísa tvey kvøld soleiðis: 6. nov. um at vera maður/kona í hjúnalagnum og 13. nov. um barnauppaling. Kvøldini byrja kl.19.30 og enda uml. kl. 22.00. Tiltakið er ókeypis, men høvi verður at geva eina gávu til Agape.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Lívdin**
*á Brekku 3*
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti, Anna Háberg talar um " Lovsong og tilbiðjan"
Í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti har evnið er "Halgan í hjúnabandinum og familjuni"
kl. 11.30 Samfelagsløta við drekka
kl. 12 Tilbiðjunarmøti har evnið er "Rættvísgering, heilaggering og dýrdargering", talari á báðum møtinum verður Zacharias Zachariassen.
Barnaansing er undir møtinum
Sunnudagsskúlin er kl. 12
Møtini sunnudag hoyrast beinleiðis á netinum.
*www.livdin.fo*

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikukvøldið 25. okt. kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
Hóskvøldið 26. okt. kl. 19.30 í KFUK: Bíbliutími.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30.
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Haldórsvík**
Missiónsvika verður í Haldórsvík frá 2 – 5 nov.

**Saron, Haldórsvík**
Mánadagin 30. okt. kl. 20.00: Húsmøti hjá Elianu og Magnus Olsen. Ver hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Mikudagin 26. okt. kl. 20.00: Bønarmøti í Saron.
Sunnudagin 29. okt. kl. 18.00: Evangeliskt møti við luttøku úr Samkomuni "Immanuel" í Hoyvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 1. nov. kl. 20.00: Bønarmøti í Saron.
Sunnudagin 5. nov. kl. 11.00: Morgunmøti við breyðbróting.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og kl. 18.00 møti við Sunnleif Jacobsen og streingjakórinum í Vágum.

**Missiónsvika í Funningi**
*í døgunum 26.–20. okt.*
Hóskvøldið 26. okt. kl. 20.00: Knút Larsen talar. Menn av Strondum syngja.
Fríggjakvøldið 27. okt. kl. 20.00: Sigfred Johannesen talar. Essa Jacobsen syngur.
Leygarkvøldið 28. okt. kl. 20.00: Regin Høgnesen talar. Petur Hans og Thomas Dam syngja.
Sunnudagin 29. okt. kl. 18.00: Niels Jacob Nielsen talar. Tær úr Vík syngja. Innsavnan til Heimamissiónina.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn. Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum hóskvøldið 26. okt. kl. 20.0. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar. Mint verður á jólapakkarnar.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30.
John Høj talar. Evni: Loyndarmál evangeliums.
Sunnukvøldið kl. 18 verður familjumøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow Eysturoy**
Aglow møti verður í Missións og Ungdómshúsinum á Glyvrum leygardagin 28. okt. kl.15.00.
Kvinnur í øllum aldri eru hjartaliga vælkomnar.
Les meira á heimasíðuni
*Aglow.fo*

**Keldan, Skálafirði**
Hóskvøldið kl. 20: Seminar við Pola Jacobsen, evni: Jobs bók.
Leygarkvøldið kl. 21: Awake við Helga Abrahamsen
Sunnudagin kl.17: Møti við Hans Jacobsen, sangur við Leigh Hjaltalin.
Barnamøti kl.17. Vælkomin í Kelduna.
*www.keldan.fo*

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikudagin kl.18.00: Tim5
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønarmøti
Sunnudagin kl.10.00: Møti
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 25. okt. Bíbiltími kl. 20.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tofta missiónshús**
Sunnudagin 29. oktober kl. 17.00 verður familjumøti við Peturi Johannesen, Ingu Jensen og Barnakórinum. Øll børn og vaksin eru vælkomin. Innsavnað verður. Boðið verður til drekkamunn aftaná. Orsakað av hesum verður eingin sunnudagsskúli kl. 14.00.

**KFUM KFUK Klaksvík**
Hóskvøldið kl.19.00 bønarløta.
Sunnudagin kl.14.00 sunnudagsskúli, kl.17.30 bønarløta, kl.18.00 Konfirmantaveitsla talari: Pól Johannesen
Ungdómsmøtið kl.21.00. Øll vælkomin.
*www.kuff.fo*

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Mikudagin kl.20.00 er bønarmøti.
Fríggjadagin kl.20.30 er ungdómsmøti.
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl.14.00 er møti við sunnudagsskúla.
Hvønn gerandismorgun kl.6.15 er morgunmøti.

**Sangløta á Viðareiði**
Leygarkvøldið 28. oktober kl. 19.30, verður sangkvøld í Saron á Viðareiði við felagssangi og spæli afturvið. Aftaná sangløtuna bjóðar samkoman í Saron til drekkamunn. Øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Mikudagin verður bønarmøti kl. 20.00.
Hósdagin verður bønarmøti kl. 20.00.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími, 1. Tim. 6. kap.
Hóskvøldið kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman.
*Vikuskiftismøtir:*
Fríggjadagin og leygardagin kl. 20.00 møti v/ Daniel Banu, presti frá Rumenia, sangluttøka úr Sandoynni og Jónhildu & Gullak. Innsavnan til Rumeniahjálpina.
Sunnudagin kl. 14.00 sunnudagsskúli. Kl. 18.00 møti v/ Daniel Banu, presti frá Rumenia, sangluttøka úr Sandoynni og Jónhildu & Gullak. Innsavnan til húsið.
Bøn- & lovsangur hálvan tíma áðrenn møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mikukvøld kl. 20.00: Heimaforbundið. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Hóskvøld kl. 20.00: Bønarløta.
Leygarkvøld kl. 21.00: Lovsangsløta. Emanuel Minos talar á stórskíggja um evnið »Endetid i lys av Jesu gjenkomst«.
Sunnudag kl. 11.00: Halgunarmøti. Nimrod Midjord leiðir og talar.
Kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Kl. 17.30: Bønarløta.
Kl. 18.00: Evangeliskt møti. Soldátur Eddie Bech talar.
Mánadag kl. 7.00: Morgunbøn.
Broyting: Árasølan er flutt til leygardagin 11. nov. kl. 19.00. Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.
*www.frelsunarherurin.fo*

**Missiónshúsið Sumba**
Leygarmorgun kl. 9 bøn.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Nimrod Midjord og Monsu Olsen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Møti í Esbjerg**
Føroyskt møti verður í Zionskirke Sognehus leygardagin 28. okt. kl.19.30 v/ Hanus Poulsen, trúb. úr Randers

**Møti í Hirtshals**
Føroyskt møti verður í missiónshúsinum á Vestergade í Hirtshals sunnudagin 29.okt. kl.18.00 v/ Hera Elttør trúb. Bjóðað verður kaffi o.a.
Øll vælkomin til møtini

**Felagið Tórshavn**
*EFTIRMETING*
Hóskvøldið 26. oktober kl. 19.00 verður vitjað á Fíggjarmálaráðnum og eftirmetingarfundur.
Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@tilhald.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
**Telduprátið, enskt 1-2 og tekning og máling verður tá ið hølini á 1. hædd eru liðug.**
*Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan mikudag og fríggjadag. Tilmelding á tlf. 316491.*
Hósdagin 26. okt.:
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen.
***OBS Lesibólkur: Vit lesa bókina »Lívsins summar«*** Oddvør Johansen. Hittast aftur hósd. 2. nov. kl. 11.00.
Samskipari: Bergljót Madsen
kl. 14.00-16.00: Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
Fríggjadagin 27. okt.:
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 10.00-17.00: Vælgerandi handverksætlan á loftinum.
kl. 12.00: Døgurði
kl. 14.00-17.00: Opið hús.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit*